gult cyan magenta svart





## Inn við skeið

| | Januar | Februar | Mars | Apríl | Mai | Juni |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Teldan & Eg | • | • | • | • | • | • |
| Internet & Eg | | • | | • | | • |
| Tekstviðgerð & Eg | | | • | | • | |
| Rokniark & Eg | | | • | | • | |
| **Teldukoyrikort-skeið** | • | • | • | • | • | • |
| Grundskeið í KT (TK) | | | • | | • | • |
| Grundskeið í stýriforriti (TK) | • | | • | | | |
| Grundskeið í tekstviðgerð (TK) | • | • | • | | | |
| Grundskeið í rokniarki (TK) | • | • | • | • | • | |
| Grundskeið í datagrunnum (TK) | • | | • | • | • | |
| Grundskeið í framløguforriti (TK) | • | • | • | | • | |
| Grundskeið í samskiftisforritum (TK) | • | • | | • | • | |
| Teldutøk roynd til teldukoyrikort (hvørja viku) | • | • | • | • | • | • |
| **Stóra teldukoyrikortið-skeið** | • | • | • | • | • | • |
| Víðkað skeið í KT (STK) | | | • | | • | |
| Víðkað skeið í stýriforriti (STK) | | | | • | | • |
| Víðkað samskiftis- og kunningartøkni (STK) | | | • | | • | |
| Víðkað skeið í Tekstviðgerð (STK) | | • | | • | | • |
| Víðkað skeið í rokniarki (STK) | | • | | • | | • |
| Víðkað skeið í datagrunnum (STK) | | • | | • | | • |
| DTP & heimasíðusmíð (STK) | | | | | | |
| Heimasíðusmíð við MS FrontPage | • | | • | | • | |
| Heimasíðusmíð við Adobe GoLive | • | | • | | • | |
| Heimasíðusmíð við Adobe GoLive - framhald | | | • | | | |
| Grafikkur til Web við Adobe Image Ready | | | • | | | |
| PDF til WEB við Adobe Acrobat | • | | | | | |
| Animering við Macromedia Flash | | | • | | | |
| Klárt til Web | | | | • | | |
| Myndaviðgerð við Adobe PhotoShop | • | | | | | |
| PDF til Prent við Adobe Acrobat | • | • | | | | |
| Skannara skeið | | | • | | | |
| Prentlutir o.a. við Adobe InDesign | | | | • | | |
| Design við Adobe Illustrator | | | | • | | |
| Klárt til prent | | | | | • | |
| MS Outlook, grundleggjandi | | • | | | • | |
| MS Outlook, framhaldsskeið | | | • | | | • |
| MS Word - frymlar og flætting | | | • | | | • |
| Projektstýring við MS Project | • | | | • | | |
| **Microsoft Certificering** | | • | | | • | |
| Framløga | | | • | | • | |
| Snarknøttar í staðin fyri mús | • | • | | | | |
| KT-trygdarskeið | | | • | | • | |
| Image Cast | | • | | • | | |
| E-business | | • | | | • | |

(TK) = Teldukoyrikort (STK) = stóra teldukoyrikort

Fyrivarni verða tikin fyri broytingum og prentvillum

**Set teg í samband við okkum og fá skránna við dagfestingum**

*Eitt hitt týdningarmesta tilfeingið hjá vinnulívinum er vælútbúgvið starvsfólk, ið nýta tøku amboðini til fulnar. Hetta krevur ný- og endurútbúgving, ið alsamt er dagførd við tøknina. Skeiðstovan KVASIR er sett á stovn fyri at ganga hesum tørvi á møti. Vit bjóða grund-, framhalds- og serskeið á høgum støði í einum ekslusivum umhvørvi, ið skarar framúr bæði hvat tøkni og komfort viðvíkur. Umframt regluligu skeiðini omanfyri hava vit eitt stórt úrval av serskeiðum, ið verða hildin eftir tørvi. Vit skipa eisini fyri heildarloysnum til virki, stovnar og einstaklingar.*



Farodane 12-00



SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

KVASIR
Skotarók 14
FO-100 Tórshavn
Tlf. 320204
*kvasir@farodane.fo*

http://kvasir.farodane.fo

**VIÐMERKINGAR**

# Nú er ovboðið – avgerðin má takast í Føroyum



**Høgni Hoydal**
*Landsstýrismaður í sjálvstýrismálum*

Brævið frá forsætisráðharranum er ein sera stór provokasjón og ein niðurgerð av øllum føroyskum sjálvstýrisstríði. Hartil er hetta sjálvsagt ein niðurgerð av øllum tí arbeiði, sum landsstýrið hevur gjørt í fullveldismálinum. Hetta er ein staðfesting av, at vit noyðast sjálvi at taka fullveldi í Føroyum.

Innihaldið í brævinum frá forsætisráðharranum má afturvíst umgangandi. Annars hava vit sagt frá okkum tjóðarrættindini og hava slept allari okkara samráðingarstøðu og søguliga møguleikan at vinna okkum fullveldi.

Í brævinum sigur forsætisráðharrin seg hava avtalað víðari gongdina við løgmann á einum fundi tann 5. november 2000.

Hetta er ikki rætt. Løgmaður hevur bert tosað óformelt við Poul Nyrup Rasmussen og hevur greitt honum frá nýggju fullveldisætlan landsstýrisins. Hetta við tí endamáli at fáa eina avtalu við donsku stjórnina um, at vit sjálv avrigga heimastýrislógina innan ásett áramál, lóggeva sjálv á øllum økjum, minka blokkin burtur og staðfesta okkara fullveldi, tá vit ynskja.

Sjálvur tosaði eg við Poul Nyrup Rasmussen í Reykjavík tann 6. november, har eg segdi honum greitt:

- At vit ikki samráddust longur, tí danska stjórnin ikki viðurkennir samráðingargrundarlagið.
- At vit nú sjálv løgdu fullveldisætlanina til rættis og hildu fólkaatkvødu.
- At eg vónaði, at stjórnin fór at góðkenna eina avtalu um framferðarháttin.
- At ongar útmeldingar áttu at vera til pressuna, fyrrenn ivamál vórðu avgreidd, tí tað fór bert at skapa ótryggleika.

### Seta kílar í

Tí kann eg heldur ikki tulka hetta brævið øðrvísi enn sum eina roynd at seta kílar ímillum samgonguflokkarnar.

Hetta skal eisini síggjast í tí ljósi, at hann tosar beinleiðis um nýggjar skipanir innanfyri ríkisfelagsskapin og um sjálvstýrislóg, sum jú er ein beinleidis stuðul til andstøðuflokkarnar í Føroyum.

Fyrispurningarnir frá Jóannesi Eidesgaard til bæði forsætisráðharran og til Ríkisumboðsmannin eru sjálvsagt liður í hesi somu royndini at rógva innaftur undir danskan statsrætt, har vit als ongi rættindi hava.

### Fullveldi einasta leið

Við brævinum frá Poul Nyrupi, er enn einaferð skorið út í papp: At uttan fullveldi, er als ongin broyting í statsrættarligu og fólkarætarligu støðu Føroya. Uttan mun til um tað verður rópt nýskipan, sjálvstýrislóg ella okkurt heilt annað, so er hetta bert smyrsl. Tá liggur alt vald og allur avgerðarrættur hjá donskum myndugleikum. Hann sigur í brævinum:

»Færøernes statsretlige og folkeretlige status vil med andre ord være uændret, dvs. som vi kender den i dag. Hvis den færøske befolkning på et tidspunkt i fremtiden træffer beslutning om at ville udtræde af riget, vil det således efter grundloven være nødvendigt med et samtykke fra regeringen og Folketinget på dette tidspunkt.«

Hetta er júst tað, sum løgmaður, undirritaði og Helena Dam á Neystabø hava sligið rimmarfast, ikki kann góðtakast, tí so eru vit ikki viðurkend sum ein tjóð við sjálvsavgerðarrætti.

### Støðan er greið

Tí er ongin ivi um, at forsætisráðharrin roynir at sleppa sær undan tí grundarlagi, sum hann longu hevur viðurkent í samráðingartilgongdini. Nevniliga, at vit samráðast á fólkarættarligum grundarlagi vid grundarlagi í sjálvsavgerðarrættinum hjá føroysku tjóðini.

Hetta er tað, sum alt okkara arbeiði byggir á:

- Vit hava eina púra greida samgonguavtalu, sum sigur, at føroyingar eru tjóð, Føroyar eitt land og at fullveldið skal útinnast í verki.
- Vit hava í bankaavtuluni frá 10. juni 1998 fingið eina undirskrivt frá donsku stjórnini um, at vit skulu samráðast um ein fullveldissáttmála og eina lagaliga skiftisskipan.
- Vit hava eina greida løgtingssamtykt frá 3. oktober 1998, sum sigur, at landstýrið skal samráðast um ein sáttmála, ið skipar Føroyar sum eitt land við fullveldi.
- Í okkara sáttmálauppskoti, sum danska stjórnin bant seg til at samráðast um tann 17. mars 2000, stendur í sjálvum innganginum, at hetta byggir á ómissiliga sjálvsavgerðarrættin hjá føroysku tjóðini.

### Vit taka sjálvi avgerðina

Tí má nú beinanvegin brævið hjá forsætisráðharranum greitt afturvísast.

Vit noydast sjálvi at brúka alla orkuna uppá okkara egnu fólkaatkvødu. Vit noyðast sjálvi at taka avgerðirnar og leggja okkara egnu framtíð og okkara egnu skiftistíð til rættis.

Einasta roynd, ið kann gerast, er at fáa donsku stjórnina at góðkenna okkara ætlan, um vit ikki sjálvi skulu boða ST frá hesum til av okkara eintingum.

Tað er alneyðugt, at vit siga hetta púra greitt nú, tí fólk eru ørkymlað og hava brúk fyri púra klárum meldingum til tess at fullveldisætlanin kann fremjast.

gult cyan magenta svart





## Jólaferðslan

**Suðuroyarleiðin:** Nýggjársdag siglir **Smyril** sum sunnudag.

**Nólsoyarleiðin:** Nýggjársaftan sigir **Ritan** av Havnini kl. 10.00 og kl. 12.00.

**Svínoyarleiðin:** Nýggjársaftan siglir **Másin** úr Hvannasundi kl. 9.10.

**Bygdaleiðir:** Koyrt verður sum sunnudag. Tó byrjar eingin túrur eftir kl. 14.20.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Rutuupplýsingin, tlf. 34 30 30
Heimasíðan: www.ssl.fo

## Landsfundur

Landsfundur felagsins verður í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 29. desember kl. 10.

Umframt vanliga aðalfundarskrá er trygd og arbeiðs- og liviumstøður umborð á skránni til viðgerðar á fundinum. Tórleivur Hoydal frá Skipasýninum og Eyðun Berth Jacobsen frá Sjóvinnufyrisitingini verða við á fundinum.

Landsfundurin verður skipaður av sóknarformonnum, men allir fiskimenn eru vælkomnir á fundin.

**Føroya Fiskimannafelag**

## Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

*ynskir øllum limum sínum við húski eini gleðilig jól og eydnuberandi nýggjár. Somu ynskir sendast øllum viðskiftafólkum okkara.*

*Heilsan*
**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**

## AGIP í nýggj høli

2. januar 2001 letur AGIP Faroe Branch upp nýggja skrivstovu Undir Bryggjubakka 1, Tórshavn. Opið verður mánadag til fríggjadag frá kl. 8.30 til 16.30

Eni GROUP

**Agip Faroe Branch**

Undir Bryggjubakka 1
P.O. Box 184
FO-110 Tórshavn
Tel 35 10 00 Fax 35 10 01

www • team 85 • fo

*Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár við tøkk fyri brátt farna.*

**P/F Einar Mikkelsen**

Vit fara í jólafrí frá 24. des. til 2. januar.

*Viðskiftafólki, familju, vinum og kenningum burturi sum heima ynskja vit eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár við tøkk f yri tað brátt farna.*

*Vit á* TOR SHIPPING

*Øllum okkara viðskiftafólki ynskja vit gott og eydnuberandi nýggjár.*

**P/F FØROYA LÍVSTRYGGING**

SKARÐHAMARS BUSSKOYRING

TAXA

MINI-BUSS

til

10

ferðandi við góðum plássi til viðføri

*Skarðhamars*
**BUSSKOYRING**
*v/ Heðin Skarðhamar*
*Tlf. 319069 ella 282069*
*Fax 320569*

Tikið verður ímóti:
FR-KORTI - DK - VISA
EUROCARD - MASTERCARD
- JCB-card

GEVIÐ BLÓÐ



## Toyota Previa GL 2,4 vørubilur

Árg: Juli 1997
Koyrt: 57750 km.
Prísuppskot: kr. 120.000,-

**P/F Esmar Simonsen**
Telf. 444405 Fax 444629

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

## Starv

innan ráðlegging og sølu

Til søludeildina hjá P/F Vestsalmon í Kollafirði verður søkt eftir fólki til ráðlegging og sølu av alifiski.

Vit seta ikki serlig krøv til útbúgving sum so, men vit rokna við, at tú ert ágrýtin og áhugað/ur í at náa góð úrslit. Umsøkjarar við eksporttekniskari ella líknandi útbúgving hava fyrimun, men tað er ikki ein treyt.

Av fremmandamálum er neyðugt at duga enskt og norðurlendskt.

Av tí at tú fert at arbeiða í tøttum samstarvi við stjóra, søluleiðara, virkisleiðara, góðskufólk, brunnbát, alarar og annars allar partar av Vestlax samtakinum, er av týdningi at tú ert fyrikomandi og leggur dent á samarbeiði.

Arbeiðið umfatar m.a.:
- Tilrættislegging av tøku av alifiski
- Samskifti við alarar og kundar
- Samskifti við brunnbátar
- Samskifti við flutningsfeløg

í tøttum samstarvi við søluleiðaran.

Vestsalmon framleiðir eftir góðskuskipanini ISO 9000/ HACCP og selur alifisk til marknaðirnar í Evropa, USA og Asia.

So hvørt sum tú búnast í yrkinum, verða avbjóðingarnar størri. Talan er um eitt mennandi starv í einum støðugt vaksandi umhvørvi, í samstarvi við altjóða fyritøkur.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Hjalta Dalheim, tel 42 16 91.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. jan. 2001. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

VESTSALMON

**P/F Vestsalmon · Postboks 82 · 410 Kollafjørður · Att: Hjalti Dalheim**

*P/F Vestsalmon er partur av Vestlax samtakinum. Virkið hagreiðir umleið 10.000 tons av alifiski árliga og her arbeiða umleið 50 fólk. Vestlax samtakið samstarvar við Pan Fish ASA. Í Føroyum eru umleið 170 fólk í arbeiði.*